# Reglugerð

## um fyriskipan og starvsreglur fyri Tryggingareftirlitið og Tryggingarráðið

Við heimild í § 190, stk. 5, og § 191, stk. 7 í løgtingslóg nr. 55 frá 9. Juni 2008 um tryggingarvirksemi verður ásett:

***Tryggingareftirlitið***

§ **1.** Tryggingareftirlitið verður skipað við einari umsiting, ið hevur dagliga virkið um hendi, og við einum Tryggingarráðið.

***Tryggingarráðið***

§ **2.** Tryggingarráðið verður skipað við 3 føstum limum og 2 varalimum. Fyri varalimir telur skeiðið frá gildiskomu av hesi reglugerð sbr. § 11, til 21. august 2012.

*Stk. 2.* Fastir limir og varalimir verða tilnevndir av landsstýrismanninum fyri eitt 4 ára skeið. Um ráðslimur doyr, ella sigur seg úr ráðnum áðrenn skeiðið er runnið, kann landsstýrismaðurin tilnevna ein nýggjan ráðslim í hansara stað fyri tað, sum eftir er av tíðarskeiðinum. Velur landsstýrismaðurin annan av varalimunum sum nýggjan lim, má hann samstundis velja nýggjan varalim.

*Stk. 3.* Tryggingarráðið skal hava gjøllan kunnleika til tryggingarvirksemi, herundir kunnleika innan løgfrøði og búskaparfrøði.

***Arbeiðsbýti millum Tryggingareftirlitið og Tryggingarráðið***

§ **3.** Tryggingareftirlitið fyrireikar mál, sum verða løgd fyri Tryggingarráðið.

§ **4.** Tryggingareftirlitið leggur fyri Tryggingarráðið øll mál av almennum áhuga, mál har serstakur ivi er til staðar og mál, ið hava víðfevndar fylgjur fyri viðkomandi felag ella eftirlønargrunn, ella sum Tryggingareftirlitið annars metir hóskandi at leggja fyri Tryggingarráðið. Tryggingareftirlitið fremur Tryggingarráðsins avgerðir og kunnar ráðið um, hvussu dagliga virkið verður røkt, herímillum viðgerð av teimum áheitanum, sum eru sendar Tryggingareftirlitinum.

*Stk. 2.* Tryggingareftirlitið kann í sínum dagliga virki, uttan at leggja tey einstøku ítøkiligu málini fyri Tryggingarráðið, taka avgerð í málum í samsvari við føstu siðvenju ráðsins ella við tey av ráðnum fráboðaðu stevnumið.

*Stk. 3.* Tryggingareftirlitið kann harumframt taka avgerð í málum, ið hava bráðskund, tí endamálið annars hevði verið burtur. Frágreiðing um hetta verður givin á næsta fundi í Tryggingarráðnum.

*Stk. 4.* Um ikki Tryggingarráðið tekur aðra avgerð, hevur Tryggingareftirlitið viðkomandi tingingar við almennar myndugleikar, felagsskapir, tryggingarfeløg v.m. og við privat. Sama er galdandi fyri samarbeiði við millumtjóða myndugleikar ella myndugleikar í øðrum londum.

§ **5.** Formaður Tryggingarráðsins stjórnar og leggur fundirnar til rættis í samráð við Tryggingareftirlitið.

§ **6.** Tryggingarráðið hevur fund á teimum av ráðnum samtyktu fundardøgum, og annars so ofta formaðurin heldur orsøk verða fyri tí, ella tá stjórin í Tryggingareftirlitinum ella tveir av limum ráðsins krevja tað. Formaðurin boðar til fundar.

*Stk. 2.* Saman við fundarboðum skal fylgja ein fundarskrá, sum tilskilar tey mál, ið koma til viðgerðar, saman við tørvandi tilfari, ið lýsir málini.

*Stk. 3.* Stjórin í Tryggingareftirlitinum, við arbeiðsfólki, hava sæti á fundum Tryggingarráðsins við talurætti, tó uttan atkvøðurætt.

**§ 7.** Tryggingarráðið er viðtøkuført, tá í minst 2 limir eru til staðar.

*Stk. 2.* Avgerðir ráðsins verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Stendur á jøvnum, er atkvøða formansins avgerðandi.

**§ 8.** Fundarfrágreiðingin skal gerast frá fundum Tryggingarráðsins. Frágreiðing skal rúma tiknar avgerðir, har tilskilað verða tey viðurskifti og sjónarmið, sum hava verið avgerandi fyri avgerð ráðsins.

*Stk. 2.* Um avgerð er tikin við atkvøðumeiriluta, verður hetta tilskilað í fundarfrágreiðingini.

*Stk. 3.* Fundarfrágreiðingin verður undirskrivað av fundarluttakarunum.

***Eftirlitsvirksemi***

**§ 9.** Tryggingareftirlitið skal javnan kanna viðurskiftini hjá tryggingarfeløgum og eftirlønargrunnum, møguliga við kanningum á staðnum.

*Stk. 2.* Tryggingareftirlitið kann krevja, at tryggingarfeløgini geva eftirlitinum tær upplýsingar, ið eru neyðugar fyri virksemi eftirlitisins. Tryggingareftirlitið skal kanna viðurskiftini hjá teimum tryggingarfeløgum, ið lógin fevnir um. Hetta er eisini galdandi, tá avgerast skal, um eitt virksemi kemur undir lógina.

**Melding fyri brot á lógina**

**§ 10.** Stjórin í Tryggingareftirlitinum og formaðurin í Tryggingarráðinum gera av, um áheitan skal sendast ákærumyndugleikanum um ákæru fyri brot á lógina um tryggingarvirksemi. Mál, har serstakur ivi er til staðar, skulu tó, áðrenn tey verða send ákærumyndugleikanum, leggjast fyri ráðið.

**Gildiskoma**

**§ 11.** Henda reglugerð fær gildi 13. desember 2010. Samstundis fer úr gildi reglugerð frá landsstýrismanninum, dagfest 21. august 2008, um fyriskipan og starvsreglur fyri Tryggingareftirlitið og Tryggingarráðið.

Vinnumálaráðið, tann 13. desember 2010

Johan Dahl
landsstýrismaður

/Arne Poulsen